komu nógvir at keypa sild til agn.

Vit høvdu ikki seyð, men sluppu kortini at hava seyð í onkra skorð sum til dømis í Kallskor og Reipaskor vestanfyri Nípuna. Pápi plagdi at fara í skoruna við teimum bóndunum, og hann fekk tvey tey bestu lombini. Tá pápi var yngri, var hann eisini fjallmaður og fekk fjalllomb. So vit høvdu altíð einar 8-10 seyðir. Men vit vóru eitt stórt hús, so tað var skjótt at brúka eitt krov. Tá ótu vit eisini tað feita, men nú vil eingin síggja tað.


Tóra og Hans sum ung

## Tvey ár á Viðareiði

Tá ið eg var smádrongur var eg tvey ár hjá ommu á Viðareiði, tá ið eg var undir skúlaaldur.

Omma hevði tað sera strævið. Omma og abbi giftust nakað áðrenn aldarskiftið, og tey giftist inn hjá langabba og langommu. Abbi róði út og var vaktarmaður á prestbátinum. Nøkur ár róði hann út í Íslandi, og nøkur ár var hann til skips við beiggja sínum Magnus, sum førdi Viðoy. Omma og abbi áttu sjey børn. Men í 1916 gjørdist abbi sera sjúkur og doyði bert 49 ára gamal, og bert níggju mánaðar seinni lá langabbi deyður frammanfyri seingina. Stuttt eftir verður elsti mammubeiggin, Jakku, sum eg eiti eftir, og sum var farin til Havnar at læra til skómakara, smittaður av tuberklum og innlagdur á Sanatoriið. Einasta vón um heilsubót var at fara til Danmarkar at fáa skurðviðgerð. Hetta kostaði ikki so lítið, og omma tekur lán upp á jørðina, hon eigur, fyri at fáa hetta fíggjað. Men hetta hjálpti einki og stutt eftir, at Jakku er komin heim aftur, er hann deyður. Omma missir tískil innan 10 mánaðir mann, verfaðir og son.

Her mátti standa á fíggjarliga, men húskið slapp undan við hjálp frá Gudi og góðum fólki. Omma hevði eisini eina bindimaskinu, og hon bant fyri fólk, ikki minst uppá skipsmenn. Hendan bindimaskinan kom til okkara á Sundi, tá omma fall frá, og mamma brúkti hana nógv til at binda uppá okkum.

Annars hevði eg tað sera gott á Viðareiði

Eg minnist ein sum kallaðist Demma. Hann var roknaður fyri at vera menningartarnaður, men øll vóru góð við hann. Tað var tað sjáldsama við honum, at teir í bygdini royndu, hvussu nógv hann kundi minnast. Hann kundi verða biðin um at fara til handils at keypa 27 ting, og hann kom aftur við øllum. Hann var eisini sera blíður og góður við børn.


Martin Kúrberg var væl umtóktur flettingarmaður á Sundi

## Nógv samband til Norðadals

Vit fóru ofta til Norðadals, har vit jú áttu hópin av skyldfólki. Tað var eisini ofta, at vit fóru hagar at spæla. Ein javnaldur hjá mær í Norðradali var Eiko Apol, so tað lá væl fyri. Eg minnist serliga væl abbasystir Charlottu, kalla Lotta, sum var so ótrúliga skilagóð. Vit kallaðu hana gumma. Hon gjørdist elligomul, og var virkin til tað seinasta. Hon var so sera góð við meg og nógv onnur. Men hon kundi kortini vera eitt sindur áfallan. Victor Danielsen plagdi at koma til Norðradals at vitja og eisini at hava møtir. Óli Reinert, pápabeiggi, var jú ein kendur limur í Brøðrasamkomuni, so teir høvdu nógv saman. Lotta var kirkjufólk, og hevði ikki heilt gott eygað til Victor. Men hetta javnaði seg. Einaferð Victor var í Norðadali, bað hon Óla fara í hagan eftir einum lambi til Victor.

Victor plagdi eisini at koma inn á Sund. Hetta var mest tá hann var á ferð, og hann steðgaði á hjá okkum.

Sjálvi plagdu vit at fara til Kaldbak á møti hjá Brøðra-samkomuni, har Hans Vang var í velmaktini tá. Tey á bóndagarðinum fóru til Kaldbak í kirkju. Doyðu fólk vórðu tey grivin í Kaldbak.

## Tá Anna basti tarvinum

Tá FF-blaðið hevði søguna hjá Onnu á Váli í 2003, hevði hon eina frásøgn um eina serliga hending á Sundi einaferð hon kom úr við hesti Norðradali. Hon greiddi soleiðis frá:

Meðan eg og hesturin ganga inn eftir Fløtunum móti Sunds bygd, sá eg at neytini lógu dygst upp ímóti hamrinum. So hugsaði eg, at eingin vandi var á ferð. Men nú loysir tarvurin frá neytunum við levind og gang. Hann kemur ýlandi, slevandi og skavandi oman móti bakkanum. Tá ið hann steðgaði, var bara hesturin millum meg og tarvin. Hjá mær var einki at gera. Eg var deyðadømd. Eg rópti til Gud, at nú mást tú hjálpa mær, eg kann einki gera. So kom tað innskotið at leypa upp í loft, spenna armar og bein út frá, og so gera eitt indianarahyl, so hart sum eg orkaði. Tarvurin, hann stóð sum negldur. Eg dýki á hestin og vit kapprunnu. Tá vit komu til portrið var tað ein haspa av jarntráði, ið var smoygd yvir báðar stólparnar. Í skundi reyk haspan av, og inn í bøin. Eg gav mær ikki stundir at leita og fáa haspuna á aftur, tí eg hoyrdi, at tarvurin var byrjaður aftur at renna. Men vit komu í túnið hjá bóndakonuni í øllum góðum. Har komu tríggir hundar móti mær, snoddaðu og lupu næstan uppá økslina á mær. Men eg kendi teir, so teir ræddist eg ikki.

Bóndakonan á Sundi, Ulla, fekk sjálvandi at vita um skilið, og hon segði: »Eg havi sagt tað við mannin, at tarvurin er mannúlvur.« Anna tordi ikki at fara einsamøll avstað aftur av ótta fyri at hitta tann illa tarvin enn eina ferð. Avrátt varð, at sonurin í bóndahúsinum, Baggu, skuldi fylgja henni á leið. Tað bar ikki vandari á, at tey ganga seg fram á tarvin, sum framvegis var líka illur. Baggu visti, hvat hann skuldi gera. Hann gjørdi nevniliga tað sama, sum Anna hevði gjørt av sínum eintingum. Hann skar í eitt ýl, og tarvurin stóð aftur sum steinrunnin, og sloppið var.

Annars minnist eg, at Anna, sum er eitt ár eldri enn eg, var so krútsterk. Hon syfti 100 punds sekkir sum einki!

Lotta, sum visti alt um neyt, plagdi annars at siga, at loysti tarvur frá neytunum var hann mannúlvur, og tað var ikki lukkuligt. Her var einki at gera uttan at taka tarvin av, og hetta varð eisini gjørt við tarvin á Sundi. Óli Reinert plagdi at siga, at tarvur skuldi ikki gerast meira enn fýra ára gamal, tí tá gjørdist hann ov djarvur.

Men Lotta ræddist ikki tarv. Gjørdist tarvur ov næskur, stillaði hon seg so, at hon kundi stara hann beint í eyguni á tarvinum, og tá endaði tað altíð við, at hann bakkaði.

## Samband við Kaldbaksbotn

Okkum dámdu eisini væl at fara inn í Kaldbaksbotn.

Norðradalsmenn høvdu ein lítlan bát standandi her. Har báturin stóð var kallað Dalastøð. Norðradalur var brimpláss, og tí bar illa til at rógva út haðani. Men tá tørvur var á feskum fiski, gingu teir yvir í Kaldbaksbotn og fóru á flot haðani. Báturin var lítil, so tað var ikki so langt tað kundi farast. Men á fjørðinum fekst so altíð eitt kók.

Vit plagdu rógva inn í Kaldbaks-botn. Har var so fult av lívi, ikki minst fugli. Her vóru til dømis havgæs, hegrar og villdunnur.

Her var eisini fitt av síli. Eg minnist eina ferð, at vit settu eitt garn inni í botninum. Men har komu bert fýra síl í. So settu vit garnið aftur. Síðan tóku vit smásteinar úr fjøruni í bátin, og so fóru vit at steina eftir sílunum! Hetta eydnaðist væl, og nú fingu vit 27 síl.

Vit plagdu eisini at skjóta fugl til matna. Um summarið skutu vit lomviga og um veturin álku. Vit skutu eisini havgæs, sum fitt var til av. Tað kann skoytast uppí, at í dag er fitt av havhesti uppi í hamrinum, men fyrst eg minnist var eingin.

Kaldbaksfjørður er ein fjørður við nógvum lívi. Eisini av skeljafiski. Tað var javnan, at vit fóru oman í fjøruna eftir øðum, sum vit løgdu á komfýrin at loypa.

Á landi fingu vit eisini væl burtur úr. Vit høvdu rabarbugarð, har tað vaks væl. Mamma hevði úr at gera við at gera raburbur til greyt og súltutoy, sum strekti alt árið.

### Komandi partur

Í komandi parti fer Jakku til skips, og hann kemur at sigla stórt sæð alla krígstíðina. Hann var við Norðbúgvanum 33 túrir út í eitt og var saman við manningini á Tór 2, áðrenn teir fóru sín seinasta túr. Tað tyktist sum at teir høvdu okkurt ánilsi…

Sosialurin